**UTTAN ÚR HEIMI**

## Vil sleppa til lækna

Fyrrverandi serbiski forsetin Slobodan Milosevic hevur biðið dómararnar í krígsbrotsmannadómstólinum í Haag lova sær til Moskva, so hann kann fáa viðgerð fyri hjartatrupulleikar.

Hetta er aðru ferð, at Milosevic hevur søkt um at sleppa til viðgerðar í Russlandi. Fyrru ferð segði rætturin nei, tí umsóknin var bara munnlig, men hesaferð er hon á pappíri. Verjar hansara halda, at hann eigur at sleppa til Moskva, tí teir halda ikki viðgerðina í Haag vera nóg góða. Teir hava samstundis veitt rættinum trygd fyri, at Milosevic kemur aftur úr Russlandi, men ákæruvaldið sigur seg ivast í hesum og vísir á, at fleiri av teimum skuldsettu krígsbrotsmonnunum frá krígnum í gamla Jugoslavia eru eftir øllum at døma flýddir til Russlands og fjala seg har. Ein onnur grundgeving fyri ivanum hjá ákæruvaldinum er, at kona Milosevic, sonur teirra og ein bróður fyrrverandi forsetan búgva í Moskva.

Milosevic, sum var forseti í 13 ár, kann fáa lívlanga fongsulsrevsing, verður hann funnin sekur í teimum krígsbrotsverkum og brotsverkum ímóti mannættini, sum hann er ákærdur fyri.



*Slobodan Milosevic*

## Vilja ikki hava eysturevropear

Írland er tað landið í ES, sum hevur ta størstu búskaparframgongdina, og eitt úrslit er, at nú er tørvur á arbeiðsmegi í landinum. Myndugleikarnir hava roknað út, at skal búskaparvøksturin standa við, skal arbeiðsmarknaðurin hava 50.000 fólk afturat um árið. Tey finnast ikki í Írlandi, og tí hevur stjórnin nevnt møguleikarnar fyri at útvega fólk úr Pólandi og baltalondunum.

Men ein kanning hjá blaðnum The Irish Times vísir, at 40 prosent av írunum vilja als ikki hava eysturevropearar at nøkta tørvin á arbeiðsmegi, og 30 prosent siga, at Írland hevur longu ov nógvar eysturevropear, og at stundin er komin til at senda teir heimaftur. 80 prosent halda, at tað kann vera rætt at innflyta arbeiðsmegi úr øðrum ES-londum, men at tað skal gerast undir strongum eftirliti.

Sum er kunnu eysturevropear fara til Írlands at søkja sær arbeiði uttan at biðja um loyvi frá myndugleikunum har. Av hinum ES-londunum eru tað bara Bretland og Svøríki, sum hava hesar reglurnar, men ætlanin er, at reglurnar skulu galda øll ES-londini innan 2011.

## Sjáldsamt hátrýst

Tað er rættiliga vanligt hesa ársins tíð, at luftrýstið er høgt yvir Danmark og skandinavisku hálvoynni, men tað er sjáldan, at luftrýstið er so stórt, sum tað var í gjár.

Danska veðurstovan sigur, at á middegi í gjár var lufttrýstið yvir Danmark 1048 hPa, og tað er tað mesta seinastu 20 árini. Nakað fyri middag var lufttrýstið yvir oynni Møn 1048,6 hPa, og so stórt hevur tað bara verið tríggjar ferðir fyrr tey seinastu 60 árini, sigur veðurstovan. Enn er tó nakað eftir, til trýstið setir met, tí tann 23. januar í 1907 ella fyri júst 99 árum síðani var tað 1062,5 hPa við Skagen.

Tað stóra lufttrýstið í Danmark stavar frá einum hátrýsti yvir Pólandi, sum er um 1050 hPa. Tað hevur givið teimum eysturevropeisku londunum frost niður í 30 kuldastig, og í Danmark máldi DMI meiri enn 16 kuldastig mánanáttina. Í einstøkum firðum er ísur lagstur á sjógvin, og veðurmenninir siga, at stendur kuldin við einar fjúrtan dagar afturat, fara fleiri firðir og sund at frysta.

# Fatah og Hamas eiga at skipa samgongustjórn

**Fatah-leiðarin Marwan Barghouti, sum situr í fongsli í Ísrael, vil hava teir báðar størstu flokkarnar at samstarva aftan á valið í morgin**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í morgin skulu palestinar velja nýtt tjóðarting. Tað er greitt, at valið stendur ímillum Fatah-flokkin hjá Abu Mazen, forsætisráðharra og tann politiska vongin av felagsskapinum Hamas. Higartil hevur Fatah sitið við valdinum, men tær seinastu kanningarnar benda á, at Hamas kann fáa meiri enn 30 prosent av atkvøðunum. Hendir tað verður Hamas ein álvarssom avbjóðing hjá Fatah. Men nú mælir ein av leiðarunum í Fatah teimum báðum flokkunum til at skipa stjórn saman eftir valið.



*Marwan Barghouti hevur fingið fimm ferðir lívlangt fongsul í Ísrael*

Mynd: Reuters

**Situr í fongsli**

Marwan Barghouti er eitt av oddavalevnunum hjá Fatah, men sjálvur sleppur hann ikki á ting, sjálvt mum hann verður valdur, tí hann situr í fongsli í Ísrael. Fyri trimum árum síðani tóku ísraelsmenn hann, og árið eftir varð hann dømdur fimm ferðir lívlangt fongsul fyri at hava medvirkað til álop á ísraelsmenn í teimum hersettu økjunum.

Fyrrakvøldið kom Barghouti óvæntað á teir palestinsku sjónvarpsskíggjarnar. Eygleiðarar halda, at ísraelsmenn loyvdu honum at siga sína hugsan, tí teir vilja heldur hava Fatah enn Hamas at vinna valið í morgin. Í samrøðu við Al Jazeera og Al Arabiya eggjaði Barghouti øllum palestinum til at fara á val í morgin.

– Við at atkvøða eru vit trúgvir ímóti frælsisbardaganum, trúgvir ímóti píslarváttunum og trúgvir ímóti Yasser Arafat og Ahmed Yassin, segði Barghouti. Tað var neyvan av tilvild, at hann nevndi Ahmed Yassin, andaliga leiðaran hjá Hamas, sum ísraelsmenn myrdu í 2004. Tí Barghouti vil hava Fatah og Hamas skipa samgongustjórn eftir valið.

– Vit eiga at skipa eina landsumfatandi nýskipanarstjórn, sum skal hava dyggan stuðul í tinginum og fólkinum, segði hann.

Politiskir eygleiðarar í Ísrael ivast í, hvussu skilagott tað var av ísraelsmonnum at lova Barghouti upp í valstríðið. Summir halda, at tað kann geva Fatah nakrar atkvøður afturat, men aðrir halda, at tað kann eggja uppaftur fleiri til at velja tann meiri víðgongda Hamas-flokkin.

# Ferðafólk hótta við uppreistri umborð á "Queen Mary"

**Eftir ætlanini kemur heimsins størsta ferðamannaskip til Rio de Janeiro í morgin, men fleiri ferðafólk sýta fyri av skipinum, tí tey halda seg ikki hava fingið tað, sum tey hava goldið fyri**

FERÐASIGLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hendan seinasta mánaðin hevur "Queen Mary" verið á rundferð í Latínamerika, men trupulleikar við einum av motorunum hava órógvað ferðina. Fyrst var skipið seinkað, tá tað byrjaði ferðina í Fort Lauderdale í Florida, og fyri at røkka teirri upprunaligu ferðaætlanini gjørdi reiðaríið av at avlýsa ferðirnar til Barbados, St. Kitts og brasilska býin Salvador.

Sum endurgjald fyri ta broyttu ferðaætlanina hevur skiparin boðið ferðafólkunum helmingin av pengunum aftur, men sambært BBC eru tað minni enn so øll, sum eru nøgd við tilboðið. Eitt av teimum misnøgdu ferðafólkuinum sigur við BBC, at tey kenna seg snýtt. Tey høvdu keypt ferðaseðil til eina rundferð, men fingu bara eina beinleiðis ferð úr Florida til Rio de Janeiro.

– Reiðaríið átti at sagt okkum tað, áðrenn vit fóru úr Florida, og nú sýta fleiri fyri at fara av í Rio, sigur tann misnøgdi ferðamaðurin Alan Berg við BBC. Hann er eitt av teimum umleið 1.000 ferðafólkunum, sum skuldu enda ta ætlaðu rundferðina í Rio de Janeiro.

"Queen Mary" er heimsins størsta og dýrasta ferðamannaskip. Tað er 345 metrar langt og 41 metrar breitt.